# Randarsól: Stevnan eydnaðist væl

**– Einasta, sum kanska ikki riggaði júst, sum vit ætlaðu, var flutningurin, tí trýstið um fjørðin lá eitt sindur øðrvísi, enn vit høvdu væntað. Men hetta lagaði seg við teimum eykatúrum, sum Teistin og Norðlýsið sigldu, sigur Erla Matras Jensen, formaður í ungmannafelagnum, Randarsól**

ÚTOYGGJASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Nú so nógvar stevnur eru kring landið alt summarið, eru vit væl nøgd við, at so nógv fólk nýttu høvi at vitja út higar, sigur Erla Matras Jensen, formaður í ungmannafelagnum, Randarsól*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hóast fólkið í Hesti er fáment, hevur bygdin framhaldandi eitt virkið ungmannafelag. Tað var hetta felag, ið ber heitið, Randarsól, sum stóð fyri teimum praktisku viðurskiftunum í samband við útoyggjastevnuna í Hesti seinasta leygardag.

Randarsól hevur eitt hampiliga stórt limatal, men í løtuni búgva øll, sum manna nevndina, í miðstaðarøkinum í Suðurstreymoy. Nógv fólk, sum hava sínar røtur í Hesti, men ikki búgva á staðnum, eru limir í felagnum. Felagið hevur sjálvsagt eisini limir í Hesti og tey, sum búgva í Koltri, eru eisini limir í Randarsól.

## Alt lagaði seg

Erla Matras Jensen, sum er gift hestmanninum, Hans Jákupi Niclasen, er formaður í ungmannafelagnum.

Hon heldur, at stevnan eydnaðist væl. Veðrið var gott, og tað var turt, tó at høgættarlotið kanska kendist eitt sindur kalt.

– Eg haldi ikki, vit kunnu siga, at nakað kiksaði. Tað einasta, ið kanska kundi verið skipað eitt sindur øðrvísi, var flutningurin um Hestfjørð stevnudagin. Vit høvdu væntað, at trýstið at sleppa um fjørðin fór at liggja eitt sindur øðrvísi, enn tað gjørdi. Tí komu fólk at bíða á Gomlurætt.

Erla sigur, at hetta kortini lagaði seg við teimum eykatúrum, sum Teistin og Norðlýsið sigldu.

## Smá túsund fólk

Formaðurin í Randarsól heldur, at seinnapartin stevnudagin vóru eini 700-800 fólk í Hesti, men sum dagurin leið, komu og fóru fólk.

Erla heldur, at út við túsund fólk tilsamans vitjaðu í oynni hendan dagin, tá ið tey eru íroknað, sum búgva í Hesti og tey, sum vóru í bygdini uppundir vikuskiftið.

– Nú so nógvar stevnur eru kring landið alt summarið, eru vit væl nøgd við, at so nógv fólk nýttu høvi at vitja út higar.

Ungmannafelagið Randarsól skipar annars fyri ymiskum tiltøkum gjøgnum árið. Afturvendandi tiltøk eru nýggjársveitsla, tunnusláing og ruddingardagur í samband við aðalfundin. Onkuntíð hevur eisini verið skipað fyri jólaborðhaldi og útferðum.

Erla Matras Jensen sigur, at Randarsól ynskir at takka øllum, sum tóku hond í við útoyggjastevnuni, ið man vera størsta einstaka tiltakið, sum ungmannafelagið hevur verið við til í nýggjari tíð.

# Bert eitt barn í skúlaaldri

**Eini 45 fólk eru skrásett at búgva í Hesti, men bert fýra børn eru undir skúlaaldur**

HESTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eini 45 fólk eru skrásett at búgva í Hesti, og av hesum eru fleiri menn enn kvinnur.

Barnaskúli er í bygdini, men har er bert ein skúlanæmingur. Fýra børn eru undir skúlaaldur, harav tað eina barnið táttar í skúlaaldur.

Útlitini fyri, at barnatalið veksur, eru einki serlig. Eitt ungt par við einum barni er í bygdini, men sum skilst, er ivasamt, um tey vera verandi í Hesti.

Hestur hevur havt dugnaligar útróðrarmenn, og enn er nakað av útróðri úr bygdini. Teir, ið rógva út, selja fiskin um uppboðssølu ella leggja hann upp í Skopun, har Sandoy Seafod keypir. Nú eru fleiri ár síðan, at fiskakjallarin í bygdini læt aftur. Nakað av landbúnaði er eisini og útoyggjaumboðið í Hesti, Sanna Silvurstein, hevur sína dagligu gongd í fjósinum.

Inni í havnini í Hesti liggja nakrir aliringar. Her gongur fiskur hjá Fiskaaling, og er hetta ein liður í lívfiskaarbeiðinum, sum annars fer fram í Skopun.



*Í Hesti er gott havnalag, og stutt er um fjørðin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



Steffi Sager, skiftisnæmingur úr Sveits:

# Veittrar farvæl við blandaðum kenslum

**Steffi Sager úr Sveits hevur seinasta árið verið skiftisnæmingur í Føroyum. Hon hevur nógvar góðar upplivingar við sær aftur til heimlandið. Millum annað hevur hon verið og rikið seyð í Vatnsdali, hildið røðu á fólkafundi og verið við í sangleikinum Jósef**

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*



*Síðani august í fjør hevur 18 ára gamla Steffi Sager úr Sveits verið í Føroyum sum skiftisnæmingur. Hon hevur gingið í 2.ð í Hoydølum og búð hjá eini familju uppi í Hoyvík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Deymurin av turrum fiski stendur út í gangin, tá hurðin verður latin upp. Turran fisk og fiskafrikadellur ynskti 18 ára gamla Steffi úr Sveits sær nevniliga til døgurða hennara seinasta kvøld í Føroyum.

Síðani august í fjør hevur Steffi Sager úr Sveits verið í Føroyum sum skiftisnæmingur. Hon hevur gingið í 2.ð í Hoydølum og búð hjá eini familju uppi í Hoyvík.

Mikumorgunin settist Steffi so aftur umborð á flúgvaran. Árið í Føroyum er liðugt, og nú gongur leiðin aftur til heimbygdina Hochdorf, sum liggur beint uttanfyri býin Luzern í Sveits. Við sær í kuffertinum hevur hon eitt nýtt mál, eina nýggja mentan og er hon hópin av upplivingum ríkari.

## Ikki bara lætt

Steffi tosar føroyskt uttan trupulleikar. Men málið er ikki komið av sær sjálvum, og tað hevur ikki bara verið lætt.

– Í byrjanini skilti eg onki, og tá var tað ógvuliga torført. Eg skilti ikki, hvat mínir floksfelagar søgdu og hugsaðu. Men so hvørt sum eg eri farin at skilja meira, so er tað vorðið stuttligari og stuttligari, sigur Steffi við einum smíli.

Tað er ein farri av suðuroyarmáli at hoyra í tosingarlagnum á Steffi. Hetta kemst av, at vertsforeldrini koma bæði úr Suðuroy.

Og tað skerst ikki burtur, at Suðuroynni er Steffi serliga hugtikin av.

– Vit hava verið fleiri ferðir í Suðuroy. Abbin hevur ein bát har, sum vit onkuntíð hava verið úti við, greiðir hon frá.

Harafturat hevur hon verið í Vatnsdali og rikið seyð, sum hon helt verða ógvuliga spennandi.

## Við í Jósef

Umframt at hava rikið seyð, so hevur Steffi eisini roynt mangt annað. Hon sigur sjálv, at flokkurin, ið hon gekk í í Hoydølum, hevði ógvuliga gott oyra fyri tónleiki. Og tað speglast eisini aftur í seinasta árinum, Steffi hevur verið í Føroyum. Hon dugir fleiri føroyskar sangir, og harafturat sang hon eisini í kórinum til sangleikin »Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið«.

– Eg helt, tað var ótrúligt, hvussu professionelt tey kláraðu at gera tað. Sjálvt um tað bara vóru amatørar, so eydnaðist tað teimum heilt ótrúliga væl, heldur Steffi.

Tað er stórur munur á skúlanum í Sveits og Føroyum, heldur gentan úr fjallalandinum. Hon heldur nevniliga, at sambandið millum lærara og næming er minni hátíðarligt í Føroyum enn heima í Sveits.

– Her tosar tú við læraran hjá tær, sum tú tosar við ein vin. Í Sveits sigur lærarin »tygum« við teg, og tú sigur »tygum« við læraran, greiðir Steffi frá.

Nú meðan royndirnar hava verið, hevur Steffi verið í starvsvenjing í tvær vikur á dagstovninum í Hoyvík. Og hetta dámdi henni ógvuliga væl.

– Vit vóru á legu í Norðadali í tveir dagar. Tað var ordiliga stuttligt.

## Helt røðu

Ætlanin hevur verið at ferðast nógv í Føroyum, men fyri hetta skuldi lata seg gera, hevur familjan í Hoyvík sitið og bíðað, til veðrið gjørdist betri. Men eydnan kann ikki sigast at hava verið við teimum. Lítið og onki av summarveðrið hevur verið, og í skrivandi stund er Steffi á veg avstað aftur.

Tó hava onkrir góðveðursdagar verið. Til dømis, tá bygdastevna var í Hvalba fyrr í ár. Tá var eisini ein fólkafundur í bygdini, og mitt á einum stórum grasvølli helst Steffi eina røðu fyri hvalbingum – á føroyskum.

– Eg var ordiliga nervøs. Eg hevði lisið taluna ígjøgnum fleiri ferðir, sigur hon smæðin.

Vertsmamman Elisabeth Holm leggur stolt afturat, at Steffi kom væl frá tí, og fólk í Hvalba vórðu ógvuliga bergtikin av, hvussu væl hon dugdi at tosa føroyskt.

## Vil aftur

Steffi sigur, at familja hennara vil eisini fegin síggja Føroyar, og tey eru ógvuliga spent uppá at síggja landið.

Í heyst ætlar hon sær eisini at síggja fótbóltsdystin millum Føroyar og Sveits, og sigur hon, at um tað ber til, so hava foreldur hennara helst langt síðani tryggjað sær atgongumerki til dystin.

– Eg fari at sakna nógv, men mest av øllum fólkini, sum eg eri vorðin so góð við. Og havið, tí í Sveits hava vit jú onki hav.

Mikumorgunin fór flúgvarin so avstað við Steffi og tí vakumpakkaða turra fiskinum aftur til Sveits.

– Tað er við blandaðum kenslum, at eg fari avstað aftur. Eg eri bæði kedd og glað. Fái ilt í búkin og eri spent. Men eg ætli mær heilt víst aftur til Føroya. Vónandi næsta summar, sigur Steffi Sager úr Sveits.



*Steffi er her avmyndað saman við vertsfamiljuni uppi í Hoyvík og ommuni og abbanum av Tvøroyri. Aftast f.v: Judith Holm, Palli Mortensen (vertspápi), Elisabeth Holm (vertsmamma), Leivur Holm. Fremst f.v: Lilja, 13 ár, Lý, 4 ár, Steffi og Sólja, 8 ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen.*